**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Sjúkrarøktarfrøðingar til Suðuroyar Sjúkrahús

**Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum:**

1 tíðaravmarkað starv fyri deildarleiðari í farloyvi á 1,0 frá 1. nov 2009 til 1. okt. 2010,

1 tíðaravmarkað starv fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi á 0,7 tíð frá 1. nov. 2009 til 1. apríl 2010 og

1 tíðaravmarkað starv fyri sjúkrarøktarfrøðing í sjúku- / barnsburðarfarloyvi á 0,5 tíð frá 1. nov. 2009 til og við 15. juni 2010.

Deildin er ein alm. kir/medisinsk deild við 30 seingjarplássum.

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga og royndir innan økið
- positiv, fleksibul og góð samstarvsevni
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- áhuga at undirvísa lesandi
- telduførleika
- til deildarleiðarastarvið er fyrimunur við kunnleika til vaktarskipanina.

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir sambart sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Føroya Landstýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Thyru Thorsteinsson fyristøðukvinnuna, 34 33 00 lok. 3215.

Skrivlig umsókn við avrit av prógvum, autorisatión, ummælum og CV skal sendast til

Suðuroyar Sjúkrahús, att: sjúkrahússtjórin
Box 51, 800 Tvøroyri

Umsóknarfreist: 26. okt. 2009

# Hovs kvøldskúli

Treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning myndugleikanna, verður hetta skeið í Hovs kvøldskúla 2009/10.

| Lærugrein | Lærari | Telefon |
|---|---|---|
| Hondarbeiði | Jenny Petersen | 373475 |

Luttøkugjaldið er 300 kr.

Tilmelding hjá læraranum í seinasta lagi leygardagin 17. oktober 2009

**Hovs Kvøldskúli**

# Spennandi handil til sølu

Handilin liggur væl fyri í Tórshavn og er partur av størri handilsketu.

Ljóðar hettar áhugavert, vinarliga send mail til fcc3365@gmail.com fyri at frætta meira.

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

# Fiskivinnuroyndir 2010 Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**
- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Innanfyri høvuðsøkini verður í ár lagdur dentur á at fáa verkætlanir, sum kunnu hava orkusparing við sær.

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**
- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[1].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. okt. 2009, kl. 12:00

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2010.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Heykavegur 6A
FO-110 Tórshavn

[1] max. 300 kkr./ár í 3 ár

**NES KOMMUNA**
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Barnagarðurin á Svangaskarði, Toftir søkir eftir 2 námsfrøðingum

Til Barnagarðin verður søkt eftir:

- **1 námsfrøðingi at arbeiða 30 tímar um vikuna, tíðaravmarkað frá 01.01.2010 – 15.12.2010, fyri námsfrøðing í farloyvi**
- **1 námsfrøðingi at arbeiða 20 tímar um vikuna til serligan tørv, tíðaravmarkað frá 01.11.2009 – 30.06.2010**

Barnagarðurin er ein ítróttarbarnagarður.

Barnagarðurin hevur tríggjar stovur – Sóldøgg, Sólareyga og Sólarglottin.

Í barnagarðinum eru 56 børn.

Barnagarðurin liggur við stadionøkið á Svangaskarði, tætt við náttúruna og við nógvum møguleikum at vera úti.

**Vit ynskja, at umsøkjarin:**
- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- Hevur hug at røra seg og vera nógv úti í náttúruni

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11 – 18

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað í starv.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðarin í Barnagarðinum á tlf 448760/565021

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 28.10.2009

**NES KOMMUNA**
**650 Toftir**
**www.nes.fo**
**nes@nes.fo**

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE
Nóatún 1 · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn · www.hav.fo

# Fiskamerkir

Seinasta freist at lata fiskamerkir inn, sum skulu luttaka í lutakasti um 12.500 kr., er 23. oktober.